VALGREINAR

# Sjómannafrádráttur

**Absalon Absalonsen.**
*Valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Vit hava brúk fyri at ungfólk velja sjógvin sum starvsøki.

Skattafrádrátturin, sjómenn og fiskimenn fáa, hevur verið nevndur í fleiri valsendingum.

Í nógvum førum tykist, sum um heimafólk hava ikki sett seg nóg væl inn í málið.

Hesin frádráttur varð settur í verk í eini tíð, tá mongd av okkara bestu fiskimonnum valdu at flyta umborð á útlendsk før og í mongum førum at búsetast í útlondum. Vandi var fyri, at vit fóru at missa okkara bestu fiskimenn, og tað hevði verðið ein vanlukka. Serskattaskipanir í grannalondunum vóru høvuðsorsøkin, har høvdu myndugleikarnir sæð vandan fyri at missa alt fólkið úr fiskivinnuni, og fyri at steðga hesi gongd givið fiskimonnum skattligar fyrimunir, og teir vóru langt omanfyri 15% í frádrátti.

Neyðugt er hjá okkum at halda fast um hesa skipan. Loft er lagt í, tá inntøkan fer upp um 500 000 kr, og tað er sjálvandi í lagi. Vit hava brúk fyri, at ungfólk framvegis fara at velja sjógvin sum starvsøki, og tað kann henda skipanin verða viðvirkandi til. Øll tosa um, at tilfeingið í havinum er ogn Føroya fólks, men henda ognin verður virðisleys, um vit ikki hava dugnaligar fiskimenn.

Vit fáa ikki hendur á okkara virðum, um ikki onkur er til reiðar at ofra stóran part av sínum privatlívi.

**Fýra mánaðar á skrivstovuni uttan at sleppa út fyri dyr ?**

Fyri at lýsa umstøðurnar hjá sjófólki, kundi ein spurt t.d. skrivstovufólk, um teimum hevði dámt at farið til arbeiðis 1. januar og verið har undir læstum hurðum til 1. mei. arbeitt 12 tímar um dagin 7 dagar um vikuna mangan undir sera truplum umstøðum. Telefonstudningurin røkkur til eina stutta samrøðu um vikuna. Neyvan nakað skrivstovufólk hevði góðtikið hetta, heldur ikki um tey fingu 15% skattafrádrátt.

Hevði ein so spurt sjómenn, um teir høvdu valt at verið heima hvørja nátt og hvørt vikuskifti og altíð havt fast undir fótum og havt møguleika fyri at tikið lut í øllum tiltøkum, teim lysti, fingið allar høgtíðir og hvørt familjuhátíðarhald við, men verið av við skattalættan í staðin, so høvdu nógvir glaðbeintir svarað ja.

Hvør sum helst kann fáa lut í hesum frádrátti.

Annars kann eg minna á, at sjómannafrádráttur er ikki oyramerktur til ávísar persónar, men er tilætlaður sjómonnum og fiskimonnum, og hvør sum vil, kann fara til skips; ein læknaváttan og eitt trygdarskeið er alt, ið krevst.

# Ítróttur gagnar samfelagnum

**Bárður Nielsen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Norðstreymoy*



Neyðugt er at geva ítróttinum betri kor at liva undir tí eg meti, at um samfelagið letur meir pening til at skapa karmarnar um ítróttin, vil hettar økja um aktivitetin runt um landið, og tá vit øll vita hvussu sunt og mennandi tað er við ítrótti, vil hettar verða spart innaftur við tað, at fólkið er frískari bæði mentalt og fysiskt, og tískil fær heilsuverkið minni at gera.

Fyri ungdómin í dag, sum brúkar sera nógv av sínari frítíð frammanfyri einari teldu og tískil ikki brúkar kroppin serliga nógv og heldur ikki kemur nóg nógv í samband við onnur menniskju, er tað serliga umráðandi við ítrótti, fyri at fáa tað neyðugu menningina bæði fysiskt og mentalt. Við hesum meti eg at vit høvdu sloppi undan einum parti av tí kriminaliteti, ið er millum tey ungu í dag, tí at tey høvdu fingið neyðugu avbjóðingarnar og identitet í ítróttinum.

# Mínar visiónir fyri heilsuverkið

**Elsa í Garði**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*



- Álitið um Heidarpsykiatri 2002 verður framt í verki.
- Kortleggjan av øllum virkseminum í samlaða Heilsuverkinum.
- Gera sær greitt, hvat man vil viðgera, og á hvørjum støði viðgerðirnar skulu vera.
- Gera okkum greitt, hvussu vit skulu náa hesum málum.
- Tann føroyski borgarin fær atgongd til arðar heilsutænastur, - eitt nú eisini í Skotlandi, USA, Týsklandi m.m
- Serfrøðingarnir (tvs. serlæknarnir og onnur) upplýsa almenningin og politikarar um sítt arbeiðisøki.
- Nútímans hølir: At tað nýggja sjúkrahúsið verður liðugt til ætlaðu tíðina, og at tað gamla verður umvælt sum skjótast.
- Skrásetingin av Krabbameinstilburðunum eigur at fáast at virka aftur!

Hetta við gransking fyri eyga. Granskingarmøguleikarnir eru serliga góðir í føroyska sjúklingabólkinum. Her hevur føroyski læknin Jan Dalberg longu gjørt eitt megnar retrospektivt (afturlítandi) arbeiði, men vegna vánarligar skrásetingarmøguleikar, fær hann ikki gjørt nakað við prospektiva (frameftirlítandi) partin.

- Barnagarð á Landssjúkrahúsið.

# Berjast fyri barnaansing

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðarfloksins*



Ein av teimum heilt stóru spurningunum hjá okkum føroyingum til hetta valið átti at verið barnaansing. Manglandi barnaansing er ein tann størsti trupulleikin, vit hava í Føroyum í dag.

Fyri ikki so langari tíð síðani flutti ein heil familja av landinum orsaka av manglandi barnaansing. Vit eru heldur ikki før fyri at geva okkara fólkum, sum hava verið uttanlands og nomið sær útbúgving, eina virðiliga vælkomu, tá tey koma heim. Tey fáa hvørki ein rímiligan bústað ella barnaansing.

Sjálv havi eg í býráðnum arbeitt fyri mennandi barnaansing til øll í fleiri ár. Í byrjanini var tann ráðandi hugsanin, at mammur skuldu ganga heima - og pedagogur varð ein eiður.

Hetta hava vit hóast alt fingið broytt. Við foreldrafelagnum og áhaldandi trýsti fingu vit allar býráðslimir til at lova meira barnaansing ella barnaansing til øll seinasta býráðsval. Hetta var eitt stórt framstig, hóast fleiri av teimum, sum lovaðu barnaansing neyvan meintu tað. Tað var bara nakað, sum teir søgdu fyri at fáa atkvøður.

Nú skal bardagin fyri barnaansing eisini flytast inn í løgtingið. Har eru eins og í býráðnum næstan bara menn. 28 menn og 4 kvinnur. So vit skulu ikki rokna við nøkrum løttum bardaga.

Hyggja vit hinum norðurlondunum, so er støðan ein heilt onnur. Kvinnurnar hava í hesum londum fingið javnstøðu. Í hesum londunum eru kvinnuligu málini høgt í metum. Bæði í Danmark, Norra og Svøríki hava sjálvt statsministarar lovað barnaansing til øll - ella ansingartrygd.

Her hava vit langt á mál. 28 - 4 í einum hondbóltsdysti er stórur munur. Men vit fara at stríðast fyri barnaansingarmálinum í næsta valskeiði. Um barnaansingarmálið ikki er loyst til næsta val, so fáa vit kanska øll tey uppstillaðu til næsta val at tosa um barnaansing.

Vilt tú gera nakað við barnaansingina í okkara landi, so vel Javnaðarflokkin. Vís at Føroyar eru eitt framkomið land og ikki eitt konservativt fundamentalistiskt land. Set kross við lista C. Set kross við eina kvinnu - tað loysir seg best.

www.lindenskov.com

# Tørvur er á einari døgnrøktarskipan

**Jastrid Nielsen**
*valevni hjá javnaðarflokkinum í Suðuroy*



Heimarøktin eigur at verða útbygt við einari døgnrøktarskipan.

Fleiri høvdu yvaleyst valt at verið búgvandi í egnum húsum um so var at tey fingu hjálp um náttina, eisini høvdu fleiri avvarðandi tikið sær av sínum um so var at tey fingu hvíld um náttina.

Vit hava nógv fólk sum av t.d sjúku, brekið, ellisbrekum, angist o.ø.tørva hjálp um náttina, í dag velja fleiri av hesum at fara úr egnum húsum á stovn ella sambýlir.

Við at havt eina vælskipaða døgntænastu, høvdu fleiri yvaleyst valt at verið búgvandi longri heima, eisini hevði tænastan hjálpt teimum avvarandi soleiðis at tey høvdu havt orku til at verið meira um tann sjúka.

Døgnrøktarskipanin eigur at verða ein samfelagslig uppgáva,har trygd fæst fyri at starvsfólkið hevur tann rætta førleikan, harvið verður trygdin hjá brúkaranum vard.



VALGREINAR

# Ferðsla og samferðsla

**Hans Jacob Hermansen,**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Fyri nærum 2 árum síðan kom nýggj ferðslulóg í gildi í Føroyum, og ymiskt er, hvussu fólk lata at. Einki er at ivast í, at okkurt er, sum eigur at verða broytt, og tað fer Sjálvstýrisflokkurin eisini at mæla til.

Revsingin fyri ymisk brot, sum í dag viðføra eftiransandi koyriroynd, eigur at verða endurskoðað, og hava vit í flokkinum loysn upp á tað. Hetta skal sjálvandi gerast í samráð við avvarðandi mynd-ugleikar, men fáa vit makt, sum vit hava akt, verður hetta dagført og broytt.

Nýggj koyrikortkunngerð er um at vera sett í gildi, og er nógv nýtt og gott í henni, men hon er eftir okkara meting ikki búgvin at seta í gildi enn. Hon skal eisini endurskoðast, um vit fáa ávirkan.

Allir landsvegir, har loyvt er at koyra skjótari enn 50 km/t á, skulu stikast av, so at seyður sleppur ikki inn á vegin. Landið hevur ognartikið økið til veg, og landið hevur ábyrgdina av trygdini. So einfalt er tað.

Hálkubreyt við tøkniligari breyt eigur at koma skjótast gjørligt, so at okkara koyrifrálæra fær bestu sømdir og útbúgvingarmøguleika, og vit sleppa undan at fara uttanlands í tí sambandi.

Í seinri grein um løgtingsarbeiðið geri eg vart við, at løgtingið eigur at virka fyri alt landið. Tí loyvi eg mær í hesum viðfangi at gera vart við, at farið eigur at verða undir bergholið Øravík-Hov skjótast gjørligt. Øll ferðsla millum norðaru og syðru helvt av Suðuroynni skal um Hovsegg, og hon er ikki egnað til ta ferðslu, sum er har í dag. Alt vinnulívið í Suðuroynni og øll onnur ferðsla ferðast eftir hesum vegnum, sum stutt sagt er fullkomiliga ógegnaður til tað, hann verður brúktur til í dag. Cost-benefit metingin, sum gjørd varð á sinni, var lítið verd. Hesum fer Sjálvstýrisflokkurin at stríðast fyri.

Flokkurin fer at fylgja við, hvussu samferðslu- og onnur viðurskifti eru kring landið alt, og at mæla til neyðugar ábøtur, har tað treingir til.

Setið ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á Føroya Løgting, tí svíkur miðjan, nytta endarnir einki!

# Fólkavillarin Høgni Hoydal skaðiligur fyri demokratiið

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Einki annað valevni hevur havt fyri neyðuni at fara í bløðini við áheitan til hini um at føra eitt siðuligt valstríð - enn Høgni Hoydal sjálvur. Vit onnur hava tikið siðuligt valstríð sum givið. Á einum støði, sum er undir øllum lágmørkum roynir hann kortini at trútta lygn eftir lygn niður í føroyingar og tað tykist sum um hann sjálvur er farin at trúgva uppá hetta - saman við nøkrum av fylgjusveinunum.

Her má talast at og tað harðliga.

Mær vitandi hevur eingin flokkur tosað um at brúka av innistandandi í Landsbankanum. Ikki ein. Tvørturímóti. Vit fílast heldur á, at ikki meira er komið í kassan hesi nógvu gullárini.

Kortini kann Høgni Hoydal ferð eftir ferð oysa út yvir blaðsíðurnar lygnir um, at andstøðuflokkarnir vilja tøma landskassan. Ikki ein hevur grett um hetta. Hetta minnnir ikki sørt um metodirnar hjá einum týskum propagandaráðharra frá 30 árunum, sum vit onnur hveppast við at nevna við navni. Og uppaftur meira hveppast vit við at taka navnið á hansara yvirmanni upp á tunguna. Størsti fólkavillari í nýggjari tíð.

Hetta er langt úti og eg kenni meg harðliga kallaðan til at ávara føroyingar ímóti tílíkum persónum og teirra framferðarhátti. Høgni Hoydal er einki minni enn ein skandala fyri ta politisku tilgongdina í Føroyum. Hann forpestar tey politisku viðurskiftini, hvar hann kemur og hevur eitt skaðiligt árin á okkara unga fólk.

Føroyingar – haldið tykkum frá hesum manni. Hann er ein spilla fyri alt demokrati. Hann byggir einki land, men brýtur niður virðir skapt av okkara forfedrum.

Man kan vera samdur ella ikki við okkum í Sambandsflokkinum um politikkin, men vit fara ikki út í hatta díki, sum Høgni Hoydal tykist at trívast so væl í.

Vit heita sjálvandi á øll um at taka undir við Sambandsflokkinum. Vit eru á einum álvarsligum vegamóti og tað má ikki henda, at arbeiði hjá Høgna Hoydal undir politiska beltinum skal bera ávøkst. Ansið væl eftir.

Og seti krossin við Sambandsflokkin týsdagin – akkerið í føroyskum politikki.

# Fuglurin í hondini og so teir á takinum

**Thomas Arabo,**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



Loysingarmenn vilja altíð telja fuglarnar á takinum. Eg minnist væl, tá 200 fjórðingamarkið varð staðfest. Tá tosaðu tjóðveldismenn um, at okkum tørvaði ikki fjarleiðir, tí vit fóru at gerast hovedrík av landgrunninum. Hvussu bleiv við tí?

**At minna á gamlar syndir**

Onkur vil kanska halda, at tað er órímiligt at eg minni tjóðveldismenn á slíkt sum hóast alt liggur nøkur ár afturi í tíðini, men teir eru hóast alt teir, ið ganga og sleingja gerðir framdar fyri 50 og 100 árum síðani í høvdið á núlivandi sambands- og javnaðarmonnum og halda tað verða rímiligt, hóast teir ikki so mikið sum vilja kennast við blokkin, ið teir sjálvir vóru við til at innføra fyri góðum 10 árum síðani.

**Fuglarnir á takinum skulu breyðføða okkum**

Tað stutta av tí langa er, at Tjóðveldisflokkurin altíð hevur talt fuglarnar á takinum, heldur enn teir, vit hava í hondini. Tað er ótrúligt at hoyra hvussu rík vit øll blíva av fullveldinum og øllum teimum nýggju vinnunum, ið fara at spíra av sær sjálvum. Meðan man hevur sitið og orðað politikk og talt fuglar á takinum hava vit fingið bíðilistar í heilsuverkinum og forsømt dag til dag umsiting í allarbestu tíðum. Nú er tíð at fara til arbeiðis og syrgja fyri at fuglurin, ið vit hóast alt hava í hondini ikki hvørvur í berum luftkastellum. Set X við lista C og fá landið í rætt lag aftur, so vit kunnu yvirtaka og gerast sjálvbjargin við skili.

# Hvítbotnaðir kapitalistar og leyst lív

**Kenneth Rasmussen**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Í seinastuni hevur tilveran hjá Sjálvstýrisflokkinum á miðjuni í føroyskum politikki ikki verið løtt. Politikkurin í landi okkara er fullkomiliga skeikladur av ríkisrættarligu støðuni.

Tað er jú nógv lættari at verða heilt úti øðrum veinginum og buka hini í høvdið við sínum víðgongdu meiningum. Men hetta merkir eisini, at vit ikki koma úr stað.

Tosað verður ikki um vinstra og høgra politikk sum aðrastaðni. Í staðin rekast flestu flokkanir runt í hesi nýuppfunnu krossskipan við loysing/samband- og vinstra/høgra-pólum, so at tað, sum vendir niður vendir upp.

Hetta hevur ikki bert gjørt tilveruna hjá einum flokki á miðjuni trupla, men so sanniliga eisini givið størru flokkunum so stóra slagsíðu, at hjá summum teirra er upprunaliga stevnan fullkomiliga farin undir vatnskorpuna, meðan aðrir tykjast rættiliga at hava mist pippið.

**Leyst lív hjá A**

Hjá Fólkaflokkinum rennur av báðum endum, so vandi er fyri at hann fer í svarta raki týsdagin.

**Hvítbotnaðir kapitalistar í E**

Tjóðveldisflokkurin er nú so fongdur við kapitalismu, at hóast nakrir av teimum ganga og tøssa í hvítbotnaðum gummiskóm, og aðrir í koti, fyri at tekkjast verkafólki og fiskimonnum, er stórur partur av flokkinum farin yvir um miðjuna og so langt til høgru, at Breckmann og Brixtofte aldri høvdu farið so langt til høgru, um teir so livdu til teir vóru hálvtannahundrað.

**Depressión í C**

Javnaðarmenninir, sum fyri fýra árum síðani, í allari bankaøsingini, fullu í løtuóvit (ella fingu blackout, sum tað eisini eitur), og mundu skrivað undir samgonguskjalið, hava hetta valskeiðið verið so negativir, at teir allir er vorðnir kølgráir og hava fingið stórar posar undir eyguni. Tað er ongin sum veit at siga frá eini so stórari politiskari depressión. Tað fer at krevja drúgva sálarliga viðgerð og mýking, áðrenn teir koma fyri seg aftur.

**Kolaniða hjá B**

Og so eru tað sambandsmenninir, sum nú eru farnir so langt út undir ta donsku vaðingina, har tað nú er vorðið so myrkt, at teir ikki síggja at lesa sína egnu stevnuskrá, og tí siga at: »Vit lova einki«!

**Einastu ráð: D**

Tað er bara Sjálvstýrisflokkurin, sum alla tíðina hevur ligið á somu positión.

Júst tí hevur tað ongantíð verið meiri umráðandi enn nú hjá Sjálvstýrisflokkinum at fáa dygga undirtøku. Bert við at seta ein sterkan Sjálvstýrisflokk á ting, verður møguligt at hála hinar flokkarnar inn móti miðjuni, soleiðis at vit í komandi valskeiði kunnu fáa arbeiðsfrið á politiska pallinum okkum øllum og landi okkara at gagni.

Men fyrst tørvar okkum tykkara stuðul. Velji Sjálvstýrisflokkin, lista D.

Lesið meira á míni nýggju heimasíðu www.tingakrossur.fo/kenneth